UTTAN ÚR HEIMI

## Metstórt hall

Kongressin í USA hevur roknað út, at hallið á amerikonsku fíggjarlógini verður 477 milliardir dollarar í hesum fíggjarárinum, sum endar tann 30. september. Í seinasta fíggjarári var hallið 375 milliardir dollarar. Næsta fíggjarár verður heldur frægari, tí tá verður hallið 362 milliardir dollarar, sigur útrokningin hjá Kongressini.

Stjórin hjá George W. Bush, forseta sigur, at hon fer at skerja hallið á fíggjarlógini, og at tað skal gerast við almennum sparingum og skattalætta. Sambært uppskotinum hjá stjórnini skulu amerikanarar hava 1,7 billión dollarar í skattalætta, men hetta eru allir politikararnir ikki so fegnir um. Teir vísa á, at skattalættin fer at skerja inntøkurnar hjá ríkiskassanum, samstundis sum útreiðslurnar fara at veksa.

John Snow, fíggjarmálaráðharri, ásannar fyri CNN, at hallið á fíggjarlógini er alt ov stórt, men hann sigur, at hallið fer at minka, tá gongd kemur aftur á búskapin.

## Afghanar heimaftur

Ein afghani, sum hevði søkt um friðskjól og uppihaldsloyvi í Danmark, varð sendur aftur til heimland sítt mánadagin.

Hetta er fyrstu ferð síðani seinasta summar, at donsku myndugleikarnir hava sent ein afghana til Afghanistan ímóti hansara vilja. Í juli í fjør vórðu tveir menn sendir til Afghanistan. Jørgen Tagge hjá ríkisløgregluni sigur, at ongar ætlanir eru um at senda fleiri fólk aftur til Afghanistan fyribils. Hetta kemst lutvíst av, at flóttafólkanevndin hjá ST hevur mælt Danmark og øðrum londum frá at senda afghanar heimaftur, tí viðurskiftini í Afghanistan eru ikki nóg trygg.

Nøkur fólk, sum flýddu til Danmarkar undan krígnum í Afghanistan, hava sjálvi valt at fara heimaftur. 196 afghanar, sum eru í Danmark, hava fingið boð um, at teir fáa ikki friðskjól, og at teir verða sendir heimaftur seinni, fara teir ikki sjálvir.

## Churchill var tann besti

Skjøl frá 1953 avdúka, at svenska akademiið var í iva, tá tað í 1953 gjørdi av at lata Winston Churchill fáa bókmentaheiðursløn Nobels.

Í skjølunum sæst, at Churchill varð valdur fram um Ernest Hemingway, og at tveir aðrir mætir rithøvundar, amerikanarin Robert Frost og bretin Walter de la Mare, vórðu eisini vrakaðir. Somu lagnu fingu bretin Graham Greene og íslendski Halldór Laxness, sum eisini vóru í uppskoti hetta árið.

Í skjølunum sæst, at limirnir í svenska akademiinum ivaðust, og at summir teirra vóru ímóti at lata Churchill heiðurslønina. Onkur teirra helt heilt einfalt, at hann var ikki so góður høvundur, og onkur annar helt tað vera óheppið at lata einum virknum politikara bókmentaheiðursløn Nobels, tí tað kundi tulkast sum ein politisk heldur enn ein bókmentalig viðurkenning. Men meirilutin av nevndarlimunum hildu bretska fotrsætisráðharran vera ein so góðan rithøvund, at hann hevði heiðurslønina uppiborna.

## Prógv ímóti Hitler

Hóast nógvir granskarar í mong ár hava roynt at finna prógv fyri, at Adolf Hitler sjálvur gav boð um at týna jødarnar í Evropa, er einki slíkt prógv funnið enn.

Men nú siga amerikanskir granskarar, at teir hava funnið prógv fyri, at Hitler sjálvur gav sínum monnum boð um at beina fyri jødunum í Fraklandi. Talan er um eitt skjal, sum Heinrich Himmler skrivaði tann 10. desember í 1942, og sum liggur í einum savni í Washington. Í skjalinum skrivar Himmler, at Hitler hevur givið boð um, at ímillum 600.000 og 700.000 franskir jødar skulu handtakast og flytast burtur. Tað stendur ikki, at teir skuldu takast av døgum.

Men tað eru ikki allir granskarar, sum halda hetta vera prógv fyri, at Hitler gav boð um at beina fyri jødunum. Summir teirra siga, at skjalið hjá Himmler hevur verið kent í fleiri ár, og at tað prógvar ikki, at Hitler gav boð um jødatýningina.

# Í dag fellur avgerðin um framtíð Blairs

**Í dag verður kunngjørt, hvør hevði ábyrgdina av, at bretski vápnaserfrøðingurin David Kelly tók lívið av sær seinasta summar**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá David Kelly valdi at taka lívið av sær í juli í fjør, gjørdi Tony Blair, forsætisráðharri, av, at málið skuldi kannast. Hutton lordur varð settur at kanna málið, og í dag kemur frágreiðing hansara, sum kann avgera framtíð Blairs í bretskum politikki.

Hóast Hutton lordur er dómari, vóru tað mong, sum ivaðust í, um hann var tann rætti maðurin til at kanna málið. Spurt varð, um hann kundi tryggja eina óhefta kanning, og sum hann var førur fyri at standa ímóti møguligari ávirkan frá teimum politisku myndugleikunum.

Men hansara dómarafelagar eru ikki í iva.

– Hutton er so avgjørdur og samvitskufullur sum fáir aðrir dómarar. Hann ber orð fyri at ganga egnar leiðir, og hann er ikki bangin fyri at taka tað avgerð, sum hann heldur vera rætta, sama hvørjar avleiðingarnar eru, sigur ein ónevndur dómari um hann.

Í dag fæst so at vita, hvørja niðurstøðu hann er komin til í Kelly-málinum.



*Tony Blair. Frágreiðingin hjá Hutton lordi kann avgera politisku framtíð hansara.*

# Lógin ímóti yvirgangi stríðir ímóti grundlógini

**Ein dómstólur í Kalifornia sigur, at amerikanska lógin ímóti yvirgangi er í stríð við amerikonsku grundlógina. Stjórnin lovar at kanna málið**

LÓGARSMÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært dómaranum Audrey B. Collins í Los Angeles er lógin, sum skal forða yvirgangi, ikki nóg neyvt orðað, og tað ger, at í minst tveimum førum stríðir hon ímóti amerikonsku grundlógini, sigur dómarin.

Hetta er fyrstu ferð, at amerikanska yvirgangslógin møtir so beinleiðis mótstøðu.

Dómarin í Los Angeles er heldur ikki einsamallur um hesa støðuna. Løgfrøðiprofessarin David Cole segði í gjár, at úrskurðurin hjá dómaranum staðfestir tað, sum onnur hava víst á fyrr. Hann og onnur vilja vera við, at Kongressin gjørdi ov skjótt av, tá hon samtykti yvirgangslógina, og at hon ikki gav sær stundir til at kanna, um lógin skerjir tey rættindini, sum amerikanska grundlógin tryggjar einstaklingum.

Ein talsmaður hjá løgmálaráðnum í Washington segði í gjár, lógin ímóti yvirgangi er neyðug, men at løgmálaráðið fer at kanna úrskurðin hjá dómaranum í Los Angeles.

Dick Cheney, varaforseti, heldur eisini fast um, at yvirgangslógin er neyðug. Hann segði í Rom mánadagin, at yvirgangsmenn hótta framvegis við at søkja at málum, og at talan kann vera um álop við evnafrøðiligum ella lívfrøðiligum vápnum.



# Maður leyp út úr glíðandi lastbili



*Í nógvu hálkuni í Vági týsmorgunin mundi hesin lastbilurin endað á blámanum. Førarin leyp út úr bilinum, tá ið hann sá, hvønn veg tað bar*

**– Vandi var fyri, at bilurin fór á sjógv, og tí leyp lastbilaførarin út úr bilinum, sigur løgreglan á Tvøroyri**

FERÐSLUÓHAPP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var ikki nógv hjá einum lastbilaførara at gera, tá ið bilur hansara fór á glið í óvanliga nógvu hálkuni hendan morgunin.

Hendingin fór fram á bryggjuni í Vági týsmorgunin um 8.30-tíðina.

Ein lastbilur hjá Jakku Vilhelm í Vági var á veg niðan av bryggjuni. Komin niðan á endan á kaibrekkuni, tey rópa, steðgaði førarin bilinum, áðrenn hann skuldi koyra út á vegin. Men so hált var í brekkuni, at bilurin stóð ikki fyri bremsunum, hóast bilførarin bæði nýtti fótbremsu og hondbremsu.

### Leyp út

Løgreglan á Tvøroyri sigur, at bilurin gleið omanaftur gjøgnum brekkuna, oman á bryggjuna millum Suðurlaks og egningaskúrarnar, ið standa har.

– Førarin sær, at her er vandi á ferð. Einki er at gera, og lastbilurin kann saktans enda á sjónum. Tískil ger førarin av at leypa út úr glíðandi bilinum, so hann ikki endar á blámanum saman við bilinum.

Løgreglan á Tvøroyri sigur, at tá ið lastbilurin kemur oman á slætt, missir hann nakað av ferðini, og á veg út um bryggjukantin, tekur kanturin eisini nakað av ferðini, ið eftir er.

– Hetta er ein stórur lastbilur við tveimum akslum aftan. Endin verður, at báðir akslarnir og hjólini aftan enda uttan fyri bryggjukantin, soleiðis at lastbilurin hongur á "búkinum".

### Lítil skaði

Við bryggjuna lá glastrevjabáturin, Alis T. hjá Paula Lassen, og afturparturin á lastbilinum hongur niður yvir fremsta partin av galendaranum.

Løgreglan sigur, at galendarin boygnaði nakað, men annars kom einki uppá bátin. Bilførarin fekk tíbetur einki mein, og lítið og einki hendi lastbilinum. Kanska hevur útstoytið fingið ein minni stoyt.

– Tað var óvanliga hált í morgun – ikki bara í Vági, men um meginpartin av Suðuroynni.

Vit spurdu løgregluna, hvussu lastbilurin var skøddur.

– Bilurin hevur nýggj, grov og góð dekk, men hann hevði ikki píkar.

Løgreglan sigur, at bilurin hevði tóma last, tá ið hendingin fór fram.

